# Fólk binda sum aldri fyrr

**Vima Leivsgarð hevur tógvhandil, og tað er hon, sum hevur latið summarfestivaltroyggjurnar og –húgvurnar gjørt. – Tað hevur verið eitt sindur av práti um hesar troyggjurnar, men eg haldi ikki, at man kann siga, at eg havi kopierað nakran, heldur Vima**



**TROYGGJUR**

*– Summarfestivaltroyggjurnar til børn og vaksin eru ikki líka sum aðrar troyggjur, sigur Vima Leivsgarð, sniðgevi*

Eydna Skaale

– Tað byrjaði við, at eg og maðurin tosaðu um, at tað kundi verið stuttligt at gjørt eina summarfestivaltroyggju. Eg mailaði so til Erik Biskopstø og spurdi, um eg kundi fáa logo'ið. Og tað var gaman í, greiðir Vima Leivsgarð frá.

Vima fekk fríar teymar at gera troyggjuna sum henni lysti, og hon gjørdi hana svarta við gulum og grønum snarlásum og summarfestival-logo'num á ermuni.



## Tógvhandil í 10 ár

Vima er von at gera mynstur til troyggjur. Hon hevur havt tógvhandil í 10 ár, og hon hevur hvønn mánað nýggj mynstur og nýggjar troyggjur til sølu. Og tað gongur sera væl.

– Fólk binda sum ongantíð fyrr. Eg haldi tað man vera tí, at vit gera so nógv við tað og hava nýggj mynstur allatíðina, sigur Vima, sum greiðir frá, at hon fær góðan íblástur frá dóttrini, sum býr niðri, og sum er sera áhugað í móta.

– Hon plagar at siga hvat hon ynskir sær, og hvat eg skal gera. Og annars fær man íblástur alla staðni frá.

## Kopi ella ikki

Eftir at troyggjan kom fram, hevur kjak tikið seg upp, um troyggjan er eitt kopi av troyggjuni hjá Guðrun og Guðrun.

Men tað heldur Vima als ikki.

– Vit eru 4 konufólk í húsi heima hjá okkum, og vit eiga allar Guðrun og Guðrun troyggjuna, tí hon er so deilig. Men hon er altso ikki líka sum hendan troyggjan til Summarfestivalin, leggur Vima dent á.

Hon sigur, at hennara troyggja hevur rendur, raglan-ermur, har snarlásið er sett í, og so er hon eitt meiri frítt modell.

– Troyggjurnar eru báðar svartar, og tað er tað. Tær hava sjálvandi eisini báðar snarlás, men snarlásið er ikki í sama stað. So eg haldi ikki, at man kann siga, at hendan troyggjan er eitt kopi av teirra troyggju.

## Senda uttanlands

Áhugin fyri summarfestivaltroyggjuni er ovurhonds stórur, og bæði menn, kvinnur og børn ganga nú í troyggjuni. Eisini húgvurnar ganga væl.

– Eg fekk eina nýggja sending av troyggjum heim í morgun, men longu nú er tað selt væl burturav, greiðir Vima frá.

Vima hevur sniðgivið troyggjuna, men hon verður framleidd uttanlands. Um nakrar troyggjur verða eftir, so verða tær eisini til keyps á Summarfestivalinum.

– Møguliga fara vit eisini at selja onkrar aðrar troyggjur, men vit hava ikki so nógvar eftir nú. Vit selja øgiliga nógv fyri tíðina, og tað er ikki bara her heima, sigur Vima.

Nógv verður sent uttanlands til bæði norðmenn og danskarar.

– Sjálvandi eru tað nógvir føroyingar, sum búgva uttanlands sum bíleggja frá mær, men tað eru eisini nógvir útlendingar. Eg havi fingið mær eina síðu á Facebook, og soleiðis røkka vit um allan heim, sigur Vima Leivsgarð.

*eydna@hotmail.com*